VÁGA KOMMUNA

# Reglugerð

## Fyri stuðul til feløg og tiltøk í Vága kommunu

**Stuðul til ítróttarfeløg og bólkar.**

- Felagið skal vera skrásett í kommununi.
- Felagið skal verða virkið.
- Stuðulin kann hækkast til feløg, sum hava miðvíst lokalt ungdómsarbeiðið.
- Roknskapur skal fyriliggja.
- Stuðul verður bert veittur eftir skrivligari umsókn.
- Gjøldini verða ásett árliga í mun til fíggjarætlanina hjá Vága kommunu.

**Stuðul til tiltøk og einstaklingar.**

- Kommunan kann veita stuðul til ávís tiltøk, sum hava týdning fyri fólkið í kommununi.
- Kommunan kann stuðla einstøkum prosjektum, sum hava týdning fyri borgarar í kommununi og eru tíðaravmarkað.
- Kommunan kann treyta sær, at tiltakið ella prosjektið er framt, áðrenn stuðulin verður goldin út.
- Roknskapur skal fyriliggja fyri stuðul yvir 5.000,00 kr.
- Fyri stuðul niðanfyri kr. 5.000,- skal kommunan vátta rokningarnar.
- Næmingaferðir, kommunan letur ikki stuðul til næmingaferðir.

**Serligur stuðul.**

- í sambandi við 100 ára føðingardagar hjá privatpersónum rindar kommunan fyri mat, høli og fólk til matger.

**Stuðul til landsfeløg**

- Kommunan kann ikki stuðla feløgum uttanfyri kommununa.

**Mannagongdir**

- Stuðul undir 2.000,00 kr. verður beinleiðis játtaður og avgreiddur av Mentunar- og Trivnaðarnevndini.
- Stuðul yvir 2.000,00 kr. verður avgreiddur av Fíggjarnevndini eftir tilmæli frá Mentunar- og Trivnaðarnevndini.
- Stuðul yvir 5.000,00 kr. verður avgreiddur av kommunustýrinum eftir tilmæli frá Fíggjarnevndini og Mentunar- og Trivnaðarnevndini.

Reglugerðin er samtykt á kommunustýrisfundi tann 26. mars 2014

Rósa Samuelsen, borgarstjóri

Georg Hansen, skrivari